# Grótkast úr Kirkjutanganum



*Tað hevur eydnast at loysa kistuna, sum nú liggur við flakavirkisbryggjuna. Tóm vigar hon eini 560 tons*



*Her verður hon sleipað útaftur og skal leggjast við nýggja pierendan*



*Kistan er komin útaftur at liggja. Børn í Nólsoy fylgja gongdini við stórum áhuga*



*Her sæst, hvussu velduga stór ein slík kista er. Tá ið hon er fylt og aftur liggur við botnin, vigar hon góð 2000 tons*

**– Tá ið grótkastið, sum nú er lagt vestur úr verandi pieri, er liðugt um ein mánaða ella so, er ætlanin at byrja uppá grótkastið, sum leggjast skal út úr Kirkjutanganum, sigur Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy**

HAVNABYGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Havnaútbyggingin í Nólsoy gongur sína gongd, og nú er tann fyrri parturin av arbeiðinum skjótt liðugur.

Síðan í fjør heyst hevur RTS, Runavíkar Transport Service, arbeitt við at leingja verandi grótkast á Nólsoyarvík við 80 metrum vestureftir.

Hetta arbeiði, sum kostar slakar 4 miljónir krónur, er nú um at verða liðugt.

### Stór uppgáva

Jógvan Thomsen, bygdarráðsformaður í Nólsoy, sigur, at ein stór uppgáva í hesum arbeiði hevur verið at loyst og flotað kistuna ella tunnuna, sum lá við endan av gamla pierinum.

– Men eg haldi ikki, vit kunnu siga, at hetta arbeiði hevur gingið so galið, tí hetta er ikki nøkur smávegis uppgáva at fara undir.

Jógvan vísir á, at í fyrsta lagi varð tilfar tikið upp úr kistuni, men kortini vísti tað seg, at tann parturin, sum lá niðast í botninum, var nógv tyngri, enn roknað varð við. Haraftrat kemur, at eitt spjell var í síðuni á kistuni, sum ikki er við á upprunaligu tekningini. Her lak sjógvur inn, og neyðugt var at tetta holið.

– Eg haldi, tað tók arbeiðsmonnunum umleið eina viku at flota kistuna, og tá ið hon flotnaði, gekk alt friðarliga fyri seg.

Hann sigur, at ein tílík kista vigar eini 560 tons, tá ið hon er tóm og meira enn 2000 tons, tá ið hon er fylt við gróttilfari.

Grótið, sum brúkt er til nýggja pierin, er sprongt og koyrt oman úr Skálanum, tey rópa. Tað var eisini her, grótið kom, sum í sínari tíð varð brúkt til gamla grótkastið, ið nú hevur ligið á Nólsoyarvík í mong ár.

### Tryggari havn

Málið hjá nólsoyingum hevur leingi verið at fáa eina tryggari og betri havn, og dreymurin hevur alla tíðina verið at leingja verandi grótkast og leggja eitt nýtt grótkast úr úr Kirkjutanganum.

Jógvan sigur, at tá ið grótkastið, sum nú er lagt vestur úr verandi pieri, er ætlanin at byrja uppá grótkastið, sum leggjast skal út úr Kirkjutanganum.

– Sambært ætlanini, verður gloppið í sjálvari innsiglingini 45 metrar, men ynskir eru frammi um, at gloppið verður nakað størri, kanska stívliga 50 metrar. Hetta fara vit at taka upp á fundi, og tá verður støða tikin til, hvussu langt verður ímillum endarnar báðar.

Jógvan sigur, at grótkastið, sum verður lagt út úr Kirkjutanganum, verður einar 50 metrar langt – alt eftir, hvussu stórt gloppið millum endarnar verður.

Spurdur, um ætlanin eisini er at hava eina kistu við endan av norðrara pierinum, sigur hann:

- Jú, tað er ætlanin, tí hetta økir nógv um trygg-leikan, tá ið siglt verður inn og út úr havnini. Tað hevur stóran týdning, at skipini vita, at djúpt er niðurfyri, og tað verður tað, um kista liggur við báðar endarnar.

Jógvan sigur, at ein betongkista, sum tann, ið liggur við nýggja pierin, var kostnaðarmikil í sínari tíð, men hann væntar ikki, at kistan við norðrara pierin verður líka stór sum hin gamla.

– Eg vænti tískil, at vit kunnu fáa eina kistu við norðrara enda fyri einar 500-600.000 krónur, sigur bygdarráðsformaðurin, Jógvan Thomsen, at enda.

# Sera lítil undirtøka á uppstillingarfundunum

**Tað letur til, at áhugin fyri skúlastýrisvalunum kring landið er ómetaliga lítil. Einans seks foreldur møttu upp til fundin á Kommunuskúlanum í Havn og átta í skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík**

SKÚLASÝRISVAL
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Skúlastýrisvalið verður 25. mai og allir skúlarnir hava nú havt uppstillingarfundir. Ella tað vil siga allir teir skúlarnir, har fólk møttu upp.

Sum Sosialurin skilir so var eitt nú ongin fundur á Eysturskúlanum í Havn vegna onga uppmøting. Og aðrir skúlar, sum vit hava tosað við , boða allir frá sera lítlari undirtøku.

Á skúlanum á Ziskatrøð í Klaksvík vóru einans átta foreldur til fundin. Tað ganga gott 400 næmingar á skúlanum.

Asbjørn Lómaklett skúlastjóri, sigur seg ikki vita, hvør orsøkin fyri lítla áhuganum er. Men hann vónar, at fleiri valevni fara at vísa seg, so at sleppast kann undan tí mannagond, har valnevndin fer inn og velur foreldur í stýrið.

– Tá kunnu foreldrini ikki sleppa sær undan, men tað er absolutt ikki tann besti hátturin, sigur Asbjørn Lómaklett.

Um 140 foreldur hava skrásett seg til skúlastýrisvalið í skúlanum á Ziskatrøð. Eisini í skúlanum við Ósánna var lítil uppmøting til uppstillingarfundin. Símun Petur Hjelm, skúlastjóri, sigur, at tey hava fingið fimm valevni á tveir listar, men hann vónar, at tað koma fleiri.

Á felagsskúlanum á Oyrabakka og í Tórshavnar kommunu skúla er støðan ikki øðrvísi. Sera lítil uppmøting til fundirnar, men báðir skúlastjórarnir eru tó bjartskygdir um sjálvt valið kortini.

Skúlastjórin á Oyrabakka setur fyrst og fremst spurnartekin við endamálið við einum tílíkum uppstillingarfundi, og tað sama ger skúlastjórin í Kommunuskúlanum.

– Foreldrini hava fingið bræv sendandi, og tað sum fyriferst á uppstillingarfundinum er snøgt sagt ein endurtøka av tí, sum stendur í brævinum, sigur skúlastjórin í Kommunuskúlanum.

Á Oyrabakka eru góð 40 % av foreldrunum nú skrásett, og tað koma alsamt fleiri inn. Í Kommunuskúlanum eru um 150 av teimum knapt 600 skrásett, og Hanus Joensen væntar enn fleiri.

– Foreldur skráseta seg leypandi, so tað fer nokk at verða á einari leið, tá freistin er endaliga úti, væntar Hanus.

Felags fyri allar skúlarnar er ein munandi afturgongd í undirtøkuni fyri valinum, sum nú sær út. Men freistin fyri at skráseta seg og fyri at vallistarnir skulu verða inni er 18. mai. Sjálvt valið verður tann 25. mai.



# Hetta er minimum

**Nú trúgvi eg, at teir flestu landsstýrismennirnir kunnu liva við tí, sum teir hava fingið. Tað sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, eftir at fíggjarlógin fyri 2004 varð samtykt á Føroya Løgtingi hósdagin. Men hann sigur eisini, at hann dugir illa at síggja, at mann kann strekkja seg longur**

FÍGGJARLÓG
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*



*Bárður Nielsen, landsstýrimaður við fíggjarmálum, hevur fingið sína fyrstu fíggjarlóg ígjøgnum. - Eg meti tað vera neyðugt arbeiða fram ímóti at fáa eina javnvág í. Soleiðis sum niðurgongdin í inntøkunum vísir seg at verða framvegis, í mun til í fjør, so dugi eg illa at síggja at mann upp á so stutta tíð hevur møguleika til at fáa javnvág, sigur Bárður Nielsen*

Nógv stríð hevur verið um fíggjarlógaruppskotið, síðani Anfinn Kallsberg og figgjarnevndin legði fram álit um broytingar í fíggjarlógaruppskotinum hjá Bárði Nielsen og Føroya Landsstýri. Tá fíggjarnevndin kunngjørdi sítt álit tann 5. mai, vóru 94 milliónir krónur skornar av fíggjarlógini. Mest sum øll øki høvdu fingið lægri játtan.

Men millum aðru og triðju viðgerð hendu nógv ting. Fíggjarnevndin tóktist at bakka eitt sindur fyri trýsti úr Tinganesi. Men hóast trýst frá Landsstýrinum, so stóð Anfinn Kallsberg stinnnur. Ikki fleiri enn 21 milliónir av teimum 94 milliónunum eru komnar innaftur.

Tað varð skorið 29 milliónir í rakstri, og góðar 6 milliónir vórðu skornar í íløgum. Nýggja inntøkumetingin er 38 milliónir, og tískil verður hallið á samtyktu fíggjarlógini 203 milliónir krónur.

Spurdur um hann er nøgdur við úrslitið, sigur Bárður Nielsen, at tað er týdningarmikið at fáa javnvág í.

– Eg meti tað vera neyðugt at arbeiða fram ímóti at fáa eina javnvág í. Soleiðis sum niðurgongdin í inntøkunum vísir seg at verða framvegis, í mun til í fjør, so dugi eg illa at síggja at mann upp á so stutta tíð hevur møguleika til at fáa javnvág, sigur Bárður Nielsen.

Øll ráðini hava fingið eina lægri játtan til rakstur og fyrisiting. Skerjingarnar til fyrisiting lógu millum hálva og 1,5 millión í hvørjum ráði. Harumframt er skorið yvir ein breiðan kamb á øllum økjum.

Landsstýrismennirnir hava drigið 21 milliónir inn aftur, og tað mesta er farið til Hans Paula Strøm og almanna- og heilsumálaráðið, sum fekk fleiri enn 13 av teimum 21 milliónunum, sum komu upp á aftur. Næstur honum er Jógvan á Lakjuni og mentamálaráðið, sum tilsamans fekk umleið 6 milliónir innaftur í mun til sparingarnar hjá Anfinni Kallsberg og fíggjarnevndini.

Vinnumál tóktust ongan góðan hava í Løgtinginum hósdagin, og fekk Bjarni Djurholm bert 1,3 milliónir innaftur, sum merkir, at eitt nú Menningarstovan verður fyri skerjingum (sí aðrastaðni í blaðnum).

– Økini, sum eru komin upp á aftur, er tað, sum landsstýrismennirnir meta seg absolut hava brúk fyri, sigur Bárður Nielsen.

– Eg dugi illa at síggja, at mann kann strekkja seg longur, eisini grundað á, at tað er komið so langt út á árið, sigur landsstýrismaðurin við fíggjarmálum at enda.

## So nógv fingu tey

Tær størstu játtanirnar, sum komu upp á aftur við triðju viðgerð, var *fólkaskúlin*, sum fekk 2,5 milliónir. *Miðnámsútbúgvingarnar* fingu 1,6 millión upp á aftur, og *Fróðskaparsetrið* fekk 1 millión upp á aftur. *Mentamálaráðið* fekk tilsamans yvir 6 milliónir upp á aftur.

*Landssjúkrahúsið* fekk 3 milliónir, eftir at fíggjarnevndin eisini hevði skorið har. Tískil er ongin skerjing í landssjúkrahúsinum í mun til upprunaliga uppskotið hjá Bárði Nielsen og Føroya Landsstýri.

*Serforsorgin* fekk 3,5 milliónir afturat í mun til ætlaðu sparingarnar hjá fíggjarnevndini.

*Eldrarøktin:* Fíggjarnevndin mældi til at spara 6 milliónir í eldrarøktini, men har komu 2 milliónir upp á aftur, og tískil er sparingin á eldrarøktini 4 milliónir.

*Innlendismálaráðið* fekk 2 milliónir skornar burtur í álitinum frá fíggjarnevndini, men har kom ein hálv millión afturat, soleiðis at sparingin nú er 1,5 millión í innlendismálaráðnum.

*Almanna- og heilsumál:* Yvir 13 milliónir komu upp á aftur hjá Hans Paula Strøm. Tað var eisini har, at fíggjarnevndin framdi tær størstu skerjingarnar.

Í *Olufyrisitingini* ætlaði fíggjarnevndin at spara 1 millión, men tann sparingin er farin niður á hálva millión.

*Heilsufrøðiliga Starvsstovan* fekk 500.000 krónur upp á aftur, og Fjarskiftiseftirlitið fekk 300.000 krónur.

**hkm**

# Fíggjarlógin 2005 er farin á glið

Fíggjarmálaráðið hevur fingið metingarnar frá ymsu ráðunum upp á lógarbundnu útreiðslurnar til komandi fíggjarár, og nú hevur fíggjarmálaráðið givið ráðunum ein karm at arbeiða innanfyri.

– Nú verður arbeitt úti í ymsu ráðunum við at koma við eventuellum tiltøkum og øðrum, sum kunnu gerast. Tey skulu koma við umstruktureringum, sum kunnu føra við sær eina rationalisering, sigur Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri.

– Til dømis er Sjómansskúlin og Maskinmeistaraskúlin eitt gott dømi um, at har leggur mann tveir stovnar saman, sum er innlýsandi, at tú gert, sigur fíggjarmálaráðharrin

Endaliga freistin hjá ráðunum at melda út til fíggjarmálaráðið, hvat tey vilja, er 14. juni. Aftaná tann 14. juni fer fíggjarmálaráðið í holt við at seta fíggjarlógina fyri 2005 saman, og tá verður sjálvandi nógv samskifti millum fíggjarmálaráðið og øll hini ráðini. Fíggjarlógin fyri 2005 skal fyriliggja Løgtinginum umleið 1. september í ár.

**hkm**

